# Búningin tekur tíð

**Hóast Jógvan Martin Olsen ásannar, at starvið sum landsliðsvenjari hevur sínar truplu síður. So er treystið at halda fram í sessinum gott. Fyrst og fremst, tí hann merkir, at liðið flytur seg rætta vegin**

- Til tíðir kann tað vera óluksáliga hart at vera landsliðsvenjari, tí sannleikin er, at eg hati at tapa. Sjálvt í kort- og borðspæli vil eg vinna – hvørja ferð! Men tá fortreytirnar til tíðir hava verið mest sum ómøguligar, er tað ikki lætt. Og onkrar løtur kunnu vera, har tú spyr teg sjálvan, um hetta er tað vert. Og um tað ikki vildi verið lættari, um tú bara vart venjari í einum felag.

- Hinvegin eru vit í eini menningarprosess, og so leingi, sum eg føli á mær, at vit flyta okkum rætta vegin, so gevur tað kortini meining. Tað er altíð soleiðis, at tað er upp til FSF at meta um mítt avrik sum landsliðsvenjari. Og meta teir ikki, at hetta er nóg gott, er avleiðingin sjálvsøgd. Men tann dagin, eg ikki haldi meg hava nakað at geva landsliðnum, skal eg vera tann fyrsti at steðga.

Orðini eigur Jógvan Martin Olsen, sum nú fer undir sína næstu undankapping sum landsliðsvenjari.

**Tola illa skaðar**

Hóast talan aftur í fjør einvíst gjørdist um tap í altjóða uppgávunum hjá landsliðsvenjaranum, so heldur hann ikki, at hann er so øgiliga ónøgdur við avrikið.

- Í løtum sóu vit, hvat liðið hjá okkum megnar. Dystin móti Skotlandi er kanska besti dystur, sum vit hava spælt, og tað er bara svartasta óhepni, sum forðar okkum í at skora. Og eisini í heimadystinum móti Italia stóð liðið seg væl.

- Munurin her í mun til hinar dystirnar, sum vit hava havt, var, at her var liðið intakt. Og so sært tú alt fyri eitt mun. Tí veruleikin er jú eisini, at vit í Føroyum eru somikið fáment, at munurin frá teimum 10 bestu og so niður til næstu 10-15 spælararnar er stórur. Tí merkist tað alt fyri eitt, tá lyklaspælarar verða skaddir. Men tað er so ein fortreyt, sum vit mugu fyrihalda okkum til, sigur Jógvan Martin Olsen.

**Gott aldursbýti**

Og skaðar merkti landsliðsvenjarin í ólukkumát fyrstu tíðina í sessinum.

Fleiri ferðir vórðu ungir og óroyndir menn tveittir fyri leyvurnar, og langt ífrá hvørja ferð spældi tað serliga væl av.

Hinvegin hevur hetta eisini givið venjaranum nakrar royndir, og nú enn eitt ár stendur fyri framman, tykist hann gleða seg til at arbeiða víðari móti málinum at skapa eitt sterkt landslið, sum hevur verið ígjøgnum eitt ættarliðsskifti.

- Tekur tú hópin í dag, so eru nakrir mans, sum er ein fastur hópur við at taka skap. Í málinum er Jákup enn við. Í verjuni hava Johan Troest Davidsen, Einar Hansen, Jón Rói Jacobsen, Fróði Benjaminsen og eisini Atli Danielsen verið fastir seinastu dystirnar. Og av hesum er tað bert Jón Rói, sum hevur nakrar serligar royndir í landsliðsverjuni. Og veruleikin er, at vit helst skuldu havt einar 8-10 mans til hesi plássini.

- Á miðvøllinum er Súni sentralur. Mikkjal Thomassen hevur prógvað sínar dygdir, eins og Ingi Højsted er á veg aftur. Og eisini har kann Atli Danielsen traðka til. Og har eru fleiri, sum kappast um næstu plássini. Frammi eru Rógvi Jacobsen, Christian Lamhauge Holst og Andrew av Fløtum, meðan Arnbjørn Hansen trokar seg uppá. Og á kantunum hava vit spælarar sum Símun Samuelsen, Christian Høgna Jacobsen og Jákup á Borg, meðan aðriri eisini troka seg móti liðnum.

- Sjálvandi kann dagsformurin gera, at hesir ikki eru heilt so tryggir, men roknast kann við, at hetta er bulurin á liðnum. Og tá er so uppgávan hjá øðrum spælarum at kroysta seg inn á liðið eisini. Er tað støðan, so havi eg ein positivan trupulleika, tí tá skal eg mest sum velja spælarar frá, heldur enn at leita eftir spælarum. Men tað er tíverri ein støða, sum eg sjáldan havi verið í.

- Eitt tað mest positiva er aldursbýtið í hópinum. Tekur tú nevndu nøvnini, so eru tað væl bara Jákup Mikkelsen og Mikkjal Thomassen, sum vit ikki kunnu rokna við at hava í fleiri ár afturat. Og tí haldi eg, at hetta landsliðið als ikki hevur toppað enn, sigur Jógvan Martin.

**Munur á mótstøðu**

Tað er sjáldan, at ein føroyskur landsliðsvenjari fæst at siga, at hann væntar sær so og so nógv stig í komandi undankapping. Og tó at undanmaður hansara eina ferð gjørdi royndina, so hevur Jógvan Martin lítlan hug at gera Henrik Larsen tað kynstrið eftir.

Veruleikin er kanska eisini, at eitt somikið lítið land sum Føroyar ikki eiga at hava ein kjans á altjóða pallinum, men møguleikar eru í hvørjum dysti, heldur Jógvan Martin.

- Vit vilja væl altíð vera tann lítli, tá metast skal undan dystunum. Men tað er hóast alt munur á møguleikunum, um tú spælir úti móti Serbia og Rumenia ella heima móti Eysturríki og Litava. So tað er sjálvandi til teir dystirnar, at vónirnar eru bestar.

Og tá mótstøðan fyri tað nógva er eystureuropisk. So er tað kanska gott, at venjingardysturin í juni er móti Estlandi. Ella vildi Luksemburg verið betri?

- Tað vísir seg í øllum førum, at tað er trupult hjá okkum at fáa lið hendavegin at spæla. Vit hava havt fyrispurningar frá fleiri londum, men eitt nú hava Luksemburg og Andorra ikki hug at koma. Og hyggur tú at FIFA-listanum, so er tað eitt sindur spell. Í so máta vildi tað kanska verið betri, um vit spældu móti onkrum av hasum liðunum, sum Australiga vinnur 10-0 á!

Veruleikin, sum fótbóltsføroyar og Jógvan Martin Olsen liva í, sigur tó nakað annað. Nevnliga at tað fyrst og fremst eru europisku liðini, sum vit mugu dystast við. Og tá verður ofta avmarkað, hvussu lætt ella trupul mótstøðan er.



*Fyri plássið á FIFA-listanum vildi tað kanska verið ynskiligt hjá landliðsvenjaranum, at vit fingu onkrar lættar dystir móti oyggjunum kring Australia. Men tað er ikki veruleikin, sum Jógvan Martin Olsen livir í*

---------------------------------------

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*